*Bjartskygdur Vidar Larsen, chefgeologur hjá Statoil:*

# – Tað gongur tann rætta vegin

*-Sjálvandi fara vit ikki nú at siga nakað itøkiligt, tí vit kappast jú við onnur oljufeløg. Men eg kann siga so mikið, at vit síggja meira og meira, og tað vit síggja, er í hvussu er ikki negativt. Vit hóma ljós í tunellini.*





*Vidar Larsen, jarðfrøðingur hjá Statoil hevur góðar vónir um at finna olju við Føroyar*

Hetta sigur ovasti jarðfrøðingurin hjá Statoil í Danmark, Vidar Larsen.

Tað er hann, sum stendur á odda fyri kanningunum hjá Statoil av føroysku undirgrundini. Hann hevur annars drúgvar royndir frá kanningum av økjunum út fyri Miðnoreg og vestan fyri Hetland.

Vidar Larsen sigur, at teir arbeiða heilt miðvíst við at kanna og tulka alt tað tilfarið, sum er vorðið tilgongiligt frá føroysku undirgrundini. Her er bæði talan um seismisku kanningarnar hjá Western og OBS kanningarnar, sum AMG-bólkurin stóð fyri í summar.

-Vit kanna alt sera gjølla. Hetta verður so grundarlagið undir tí, sum vit fara at gera komandi ár, áðrenn fyrstu loyvini at bora verða givin. Her er bæði talan um at "reprocere" tvs. viðgera av nýggjum verandi seismiska tilfarið men við meiri framkomnari útgerð og so kann talan vera um at gera nýggjar seismiskar kanningar.

Vidar Larsen sigur, at Statoil fegið vil geva teir upplýsingar til føroyska almenningin, sum til ber, men finna teir okkurt sera áhugavert, so eru teir noyddir til at halda hetta loyniligt fyri sínum kappingarneytum, sum eru hini oljufeløgini.

**Markið avgerandi**

Vidar Larsen sigur, at teir bíða spentir eftir, hvat fer at henda í komandi samráðingum um markið.

-Tað er greitt, at ein loysn átti at verið funnin á marknaósemjuni, áðrenn farið verður undir fyrsta útbjóðingarumfarið á føroyskum øki. Tað eru nettup tey økini, sum liggja næst miðlinjuni, sum eru mest áhugaverd fyri oljufeløgini. Tað ber nevniliga betur til at kanna tey, tí her er antin einki ella lítið basalt. Harafturat vita vit, at talan er um somu jarðfrøðiligu løgini sum hinumegin, har bretar hava funnið olju. Samanhangur er millum seismikkin á bretskum og føroyskum øki í hesum sokallaðu umstriddu umráðunum sigur norski jarðfrøðingurin við Sosialin.

Hetta ger tað tí eisini natúrligt, at tað verður byrjað at leitað júst í økinum vestan fyri Foinaven og Schiehallion-keldurnar.

Men Vidar Larsen sigur, at tað er eingin lætt uppgáva at finna oljufelt, og tí má ein rokna við at bora fleiri "turr hol", áðrenn tú rakar við olju ella gass.

**Til Føroya í november**

Vidar Larsen sigur annars, at teir fara at koma til Føroya í november at leggja fyribils úrslitið av kanningunum fyri oljuumsitingina.

Statoil er við í einum samtaki saman við Mobil Oil og Enterprice Oil.

-Vit eru eisini sera áhugaðir at vita, hvat føroyska oljuumsitingin hevur í kvittanum í Lopra.

Statoil hevur áður sagt seg sinnað til at vera við til at gjalda, um so er at føroyingar ætla sær at fara undir aftur at bora í Lopra ella gera líknandi boring aðrastaðni.

**Rymið ikki - bíðið eftir oljuvinnuni**

Vit spurdu Vidar Larsen, hvørji ráð hann hevur til teir føroyingar, sum í hesum døgum heilt hava mist trúnna upp á framtíðina og flyta av landinum med alla'

-Eg haldi kanningarnar av undirgrundini eru so mikið áhugaverdar, at eg hevði verið búgvandi í Føroyum enn eina tíð fyri at síggja, hvat hendir.

Hann vísir á, at verður fyrsta útbjóðingarumfarið í 1996 ella 97, so fer virksemi longu á vera stutt eftir í sambandi við leiting. Um olja verður funnin ella ikki, so kemur tað kortini at geva nakað av arbeiði. Og verður olja funnin, so kemur veruligt virksemi í gongd. Er ein heppin, so nýtast tað ikki at ganga so nógv, ar sigur ein heldur bjartskygdur Vidar Larsen.

jan


*Minnist til haldaragjaldið*

KOYRIKORT
Privat
sum vinnuligt
– so er tað ...
KOYRISKÚLIN Á ARGJUM
Ring og bíð um tíð
12270 / 86680

NORDISK KULTURFOND

bevilger bidrag til nordiske samarbejdsprojekter inden for kultur i bred forstand, inklusive forskning og uddannelse. Der kan også bevilges støtte til samarbejde med internationalt perspektiv med det formål at præsentere nordisk kultur og kultursyn.

Bidrag bevilges primært til projekter af engangskarakter og med stor nordisk bredde, i praksis med mindst tre deltagende lande.

Formålet med bidrag fra fonden er bl.a. at

- fremme den brede folkelige forankring af og forståelsen for det nordiske kultursamarbejde
- støtte og udvikle det høje kvalitetsniveau i det nordiske kulturliv,
- støtte nyskabende aktiviteter, eksperimenter og tværsektorielle samarbejdsaktiviteter.

Fondens bestyrelse vil særlig satse på

- samarbejdsprojekter for og med børn og unge, specielt initiativer der fremmer gruppens aktivitet og medvirken,
- mediesamarbejde og kulturformidling mellem de nordiske lande,
- samarbejdsprojekter der fremmer sprogforståelsen i Norden,
- samnordiske kulturindsatser for at mindske fremmedhad/racisme

Ansøgningsblanketter med vejledning samt tillægsoplysninger om fondens støttemuligheder kan rekvireres hos

**Nordisk Kulturfond**
Store Strandstræde 18
DK-1255 København K
Tlf. 33 96 02 00

eller hos

**Færøernes landsstyre**
Postbox 64
110 Tórshavn
Tlf. 11080